## DAGSINS MEINING

# Bush og tey neokonservativu

Bush er komin í álvarsligar trupulleikar og stendur fyri skotum frá øllum síðum. Fyri handfaring sína av krígnum í Irak, av vali av nýggjum hægstarættardómara, fyri væntandi leiklutin í herviligu ódnini herfyri og nú fyri ólógliga virksemið millum sínar næstu embætismenn og hjá leiðandi republikanarum í lóggevandi tingunum. Kring allan heim havast politikarar og pressan at Bush. Eisini høgravenda pressan í Danmark tekur undir við kritikkinum og sunnudagin skrivar konservativi Berlingarin eina hvassa oddagrein móti Bush. "Plamegate er et symptom på forfaldet i Bushs ledelse og præsidentens mænd betaler prisen for moralsk skråplan" skrivar blaðið. Vit skulu ikki her reksa upp øll málini, har Bushstjórnin hevur gjørt seg seka í bæði maktmissbrúki, skeivari information og vanvirðing av tí sanna demokratiinum. Tað kennast tey flestu við frá mongu útlendsku loftmiðlunum.

Hvønn týdning ella áhuga hevur hetta so fyri okkum í Føroyum? Kann tað ikki vera okkum tað sama, hvussu ein amerikanskur forseti tíggjar sær? Eftir okkara tykki eigur hetta at hava okkara áhuga. Hóast føroyski almenningurin ikki ger nógv hóvasták burtur úr tí, sum hendir rundan um okkum, so síggjast av og á viðmerkingar serliga frá fólki, sum taka undir við Bush og síggja hann sum veruliga verjan av okkara vesturlendsku samfeløgum. Hesi fólk eiga at steðga á og geva sær gætur, hvat í veruleikanum hendir í USA, á Capitol Hill í Washington og annars handan leiktjøldini. Tað kunnu tey m.a. við at fylgja við á BBC skíggjanum.

Henda heimsgitna útvarps- og sjónvarpsrás gevur okkum eitt sera gott innlit í tað, sum hendir í "Gods own country". Eitt nú hava danska DR2 og SVF filmsrøð um baklandið og ideologiska grundarlagið hjá Bush, tey neokonservativu. Filmsrøðin hevur eina gjøgnumgongd av teimum neokonservativu í USA og teimum mest víðgongdu muslimunum í arabiska heiminum. So løgið tað kann ljóða fyri okkum, er her ein líkheit, nevniliga hon, at bæði tey neokonservativu og ekstremu muslimarnir brúka sama vápn í royndunum at fáa og varðveita vald. Hetta vápn er ótti. At skapa ótta í einum og hvørjum. At undirgrava veruliga og sanna demokratiið við teimum mest tvitnu vápnunum at vísa á, hvussu vandamikil tey sokallaðu egoistisku liberalismu er fyri ávikavist eitt kristið USA og eitt islamiskt samfelag.

Um vit vilja tað ella ikki, so hava vit her við fundamentalismu at gera. Veruleikin, sum m.a. kemur fram í hesum BBC sendingum, er tann, at tú hevur religiøsar fundamentalistiskar kreftir og valdsharrar í USA øðrumegin og í muslimskum londum hinumegin, sum als ikki ynskja frælsi fyri tann einstaka. Sum vilja trútta/tvinga niður í øll onnur teirra egnu og einastu tulking av sannleikanum. Hugsið um tey mongu á demokratiska og humanistiska vonginum í USA, sum eru gjørd til fíggindar av USA, hvussu hesi eru fyri bakbiti. Tá orðið liberalur verður brúkt sum ókvæmisorð í hesum samanhangi, so fevnir tað um øll tey á miðjuni og báðumegin miðjuna á tí politiska ásanum, um tey intellektuellu, um listafólkini, tey, sum vit eisini vanliga nevna humanistar. Royndirnar hjá Bush at broyta ta so týðandi "javnvágina" í Hægstarætti við at seta tveir sera konservativar dómarar er bara ein partur av hesi óhugnaligu gongd, sum skal geva teimum neokonservativu fundamentalistunum alt valt í USA. Hetta er ein gongd, sum eisini vit í Europa, eiga at hava eina meining um og berjast ímóti.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ein óhugnalig uppliving

**Erik Christensen,**
*Porkeri*

Den 31-10 2005 hentede jeg min kone i lufthavnen kl. 14:10. Vi tog en bekendt fra Suðuroy - med i bilen til Tórshavn. Han klagede over stærke vedvarende smerter i højre lyskeregion. Flyturen fra Danmark til Færøerne havde været en meget smertefuld oplevelse for ham. Vi kunne se, at hans tilstand forværredes og kørte så hurtig som muligt til Landssygehuset i Tórshavn, hvor vi ankom kl.15:00. Sygeplejersken i modtagelsen nægtede at indskrive ham med den begrundelse, at patienten først skulle have en henvisning fra vores bekendts egen læge i Vágur på Suðuroy, men hun mente dog efter lidt betænkningstid, at vi kunne forsøge på lægehuset i Tórshavn. Vi sagde, han havde haft symptomerne i et døgn. Syge-plejersken mente, at så længe han havde stærke smerter, var det ikke noget at være bange for. Hun beroligede patienten med bemærkningen om, at hun aldrig havde oplevet, at nogen var død af blindtarmsbetændelse, men hun ville dog prøve at få fat i en læge. Efter en halv times ventetid, meddelte hun os, at vi var nødt til at køre til lægehuset for at få vores bekendt indlagt på Tórshavn sygehus. Lægehusets læge konstaterede, at han havde symptomer på blindtarmsbetændelse og gav besked til sygehuset, at han måtte indlægges omgående. Efter yderligere en halv times ventetid i venteværelset på sygehuset blev han endelig indlagt kl. 16:30. Kl. 19:00 fik han sin perforedede blindtarm fjernet. Han har fomodentlig været i livsfare, hvis operationen var blevet yderligere forsinket.

Med forundring måtte vi konstatere, at der ikke med det samme var en læge, der kunne vurdere patientens tilstand. Hændelsesforløbet kunne ske for alle.

# Svar til fyrispurning frá Jóhan Dahl

**Johnny í Grótinum,**
*formaður Búskaparráðsins*



Í lesarabrævi í tíðindabløðunum tann 1. november hevur Jóhan Dahl ein fyrispurning til formann Búskaparráðsins um útgávuna av frágreiðing ráðsins. Tað er ikki á hvørjum degi, at løgtingsmenn vísa virksemi Búskaparráðsins ans, tí vil eg nýta høvi at takka Jóhan Dahl fyri sýndan áhuga. Í Búskaparráðnum verða vit ofta lastaði fyri at vera í so provokerandi, men í hesum førinum tykist fyrispurningurin fullkomiliga óprovokeraður, tí formanskapurin í ráðnum hevur onki fráboðað um konjunkturfrágreiðing ráðsins.

Svar uppá ítøkiligu spurningarnar:

(1) Um Búskaparráðið hevur gjørt sítt arbeiði higartil í ár til lýtar, má vera upp til Fíggjarmálaráðharran, Løgtingið og almenningin annars at meta um. Sambært lógini er endamálið við ráðnum "at fylgja við gongdini í landinum og at ráðgeva um búskaparlig viðurskifti", meira ítøkiliga skal formanskapurin í ráðnum minst eina ferð um árið gera "frágreiðing um gongdina í føroyska búskapinum, har mett verður um búskaparligu støðuna, útlitini framyvir, og hvørji tiltøk eiga at verða framd". Í august lat Búskaparráðið úr hondum eina frágreiðing um búskaparvøkstur í Føroyum, har búskaparfrøðilig ástøði og hagfrøði var nýtt til at lýsa tær avbjóðingar føroyska samfelagið hevur fyri framman, um ætlan Landsstýrisins at vera millum fremstu búskapir í 2015 skal fremjast í verki. Frágreiðingin var send Føroya Løgtingið, men hon er annars eisini atkomilig á heimasíðu ráðsins, www.ecouncil.fo. Annars er tað ætlan formansins eftir innanhýsis viðgerð av spurninginum at geva eina frágreiðing út afturat í ár, hendan frágreiðing viðgerð konjunkturgongdina í føroyska búskapinum.

(2) At konjunkturfrágreiðingin ikki er útkomin enn er onki óvanligt, tí bæði í 2000 og 2003 kom hendan frágreiðing í desember tey árini.

(3) „Arbeiðarin er løn sína verdur" sigur svarta bók, men um ráðslimirnir eru sína samsýning verdir er - sambært lógini um Búskaparráð - ein spurningur millum Landsstýrið og ráðið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.